## Øssur tekur eitt ár afturat

38 ára gamli veteranurin hjá B68 hevur sagt felagnum frá, at hann eisini tekur eitt tørn í 2010. Øssur Hansen er um nakar Mr. B68 í verandi hópinum hjá B68. Hóast hann sum spælari eisini hevur verið í GÍ, B36 og donsku feløgunum, Vejle, Herning og B93, so er tað fyrst og fremst B68, sum hevur verið hjartabarn hansara. Og tað verður tað eisini í 2009. Fyri einum ári síðani vóru boðini annars, at hann var givin, men hann fann tó gaggurnar fram aftur. Í ár hevur hann verið týðandi partur av góðu úrslitunum hjá B68, og tað ætlar hann sær altso eisini at vera í 2010, veit heimasíðan hjá B68 at siga. Øssur var eisini í fleiri ár fastur maður í føroyska landsliðshópinum, har tað gjørdist til 51 landsdystir og tvey mál.




## Maze vann EM

Danski Michael Maze vann í gjár EM-heitið í borðtennis. 28 ára gamli danin spældi í finaluni móti Serner Schlager úr Eysturríki, og hendan dystin vann Maze 11-8, 11-8, 12-10, 6-11, 11-7. Umframt at vinna gull í einmansleiki, var Maze eisini høvuðsmaðurin danska silvurinum í liðkappingini, og er talan um fyrstu ferðina yvirhøvur, at Danmark vinnur meira enn eitt heiðursmerki í EM í borðtennis.



Heðin á Lakjuni gav við skjótleika sínum 07 Vesturverjuni stórar trupulleikar. Her er hann í nærdysti við Aco Pandurovic
Mynd: Álvur Haraldsen

### KÍ-07 Vestur 2-1 (1-0):

# Vestur og farin

KÍ

07 Vestur

**KÍ vann botnfinaluni og hevur tí framvegis vón um at lívbjarga sær í Vodafone-deildini. Hinvegin er tað nú ein veruleiki, at steðgurin hjá 07 Vestur í fremstu deildini bert gjørdist eitt ár hesaferð**


jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Regnið argaði allan dystin í Klaksvík, og tað kendist nakað sigandi, at slúsurnar av álvara opnaðu seg seinasta korterið av botnfinaluni. Við úrslitinum, sum stóð á talvuni, tá 90 minuttir vóru farnir, skolaðu seinastu vónirnar hjá 07 Vesturi burtur.

### Uppiborið

Veruleikin er væl eisini, at talan var um uppibornan sigur hjá KÍ, sum støðugt var liðið, ið vildi meira á vøllinum, og sum eisini var liðið, sum kom til so nógv teir mestu møguleikarnar.

Fyrra málið var tó kanska tann minsti av hesum, tá Hjalgrím Elttør úr truplum vinkli skeyt hálvforkølað við vinstrabeininum. Men forkølað ella ikki, so snýtti skotið fullkomuliga Trygva Askham í gestamálinum.

07 Vestur hevði sum heild serstakliga lítið at bjóða uppá fyri steðgin, og Jákup Mikkelsen hevði úr at gera við at halda seg heitan í tráa ælaveðrinum, sum dagurin beyð honum og hinum á vøllinum.

KÍ hevði kanska ikki so nógvar aðrar møguleikar, men tað sást á øllum brøgdum, at teir á degnum vóru grammara liðið.

Eftir steðgin mannaði 07 seg nakað upp, og ta einu ferðina var Tór-Ingar Akselsen um reppið at javna, tá hann gjørdist leysur, men Jákup bjargaði tó frágera væl.

Í hinum endanum gjørdist alt meira opið, so hvørt sum gestirnir royndu at spenna álopsbogan. Men hvørki Heðin á Lakjuni ella Steffan Kalsø vóru nóg neyvir, tá teir høvdu risa-møguleikar, men tað stillaði nervarnar hjá heimaáskoðarunum, sum Sørmund Kalsø stútaði hornaspark í netið.

Sigurin kundi verið munandi størri, men hóast tveir fríleyparar afturat, so fekk KÍ ikki punkterað spenningin. Og tað var um reppi at kosta móti dystarenda.

Beint áðrenn teir 90 minuttirnir vóru farnir, fekk Gunnar Haraldsen stútað hornaspark í netið, eftir at KÍ í tveimum umførum hevði bjargað mest sum á strikuni. Og so flutti 07 Vestur alt fram seinastu løtuna – men til fánýtis skuldi tað vísa seg.

### Toppurin bíðar

Við sigrinum heldur KÍ framvegis fast um vónina um, at felagið eisini er í fremstu røð í 2010. Men enn er arbeiðið ikki liðugt – og tað langt ífrá.

Seinastu tvey umførini skulu sum minimum geva fýra stig, um KÍ skal liva víðari, og hesi stig skulu altso fáast til vega móti HB í Gundadali og EB/Streymi í Klaksvík.

Meira enn nakað man vónin hjá KÍ nú vera, at HB veruliga hevur fingið gummibein av slíkum slag, at teir snáva einaferð afturat. Gera teir tað, kann KÍ syrgja fyri, at FM-spenningurin heldur sær til seinasta leikdag, har KÍ so aftur kann gera sítt fyri at taka spenningin úr hesum stríðnum aftur.

### Vestur og farin

Hjá 07 Vesturi var dysturin ein staðfesting av, at bjargingarroyndin hjá felagnum ikki rakk á mál. Tað vóru annars tekin um ein bjarging, tá dystirnir móti Víkingi og B36 vórðu vunnir, men tað eydnaðist ikki liðnum at halda fast í momentinum, sum tá varð skapt, og seinasta umførini steðgaði meira ella minni heilt upp hjá vágamonnum, sum altso aftur spæla leygardagsfótbólt komandi kappingarár.

## Fingu ikki armarnar niður

Jón Nielsen hjá 07 Vestur var vónbrotin, men hann tóktist avkláraður um støðuna, tá tað eftir dystin í Klaksvík kundi staðfestast, at 07 Vestur verður annar av niðurflytarunum í ár.

- Vit høvdu ov lítið at bjóða uppá í dag, og tað var nokk uppiborið, at KÍ vann dystin.

Fyri einum trimum umførum síðani tóktist tað, sum vóru tit veruliga ígongd við eina bjargingarroynd. Kiksaði hon, tá tit mistu sigurin móti ÍF seinast?

- Eg haldi, at hon steðgaði upp undan hesum. Til dømis mistu vit eisini sigurin, tá vit spældu móti NSÍ. Eg haldi, at prátið, sum gekk um, at vit nú vóru í ferð við at bjarga okkum, fekk armarnar hjá spælarunum upp, og vit hava ikki fingið armarnar niður aftur síðani. Vit arbeiða ikki sum eitt lið, men dúva upp á einmansavrik og langar bóltar, og tað er tað, sum oyðileggur okkum í løtuni, segði Jón Nielsen.

Tit hava nú tveir dystir eftir at spæla í ár. Hvussu er motivatiónin til hesar dystirnar?

- Um hon er tann sama, sum hon var í dag, so er hon øgiliga vánalig. Her er ov lítil vinnaramentalitetur og stríðsvilji í løtuni. Eg hopi bara tað, at menn fara at spæla fyri at vinna og fyri at hava tað stuttligt í seinastu dystunum, segði Jón Nielsen.

-mørk

## Kunnu bara gera okkara

Eftir næsta sigurin á rað, vóru smílini eitt sindur frammi í KÍ-hølunum, tó at teir als ikki eru komnir á mál við bjargingarroyndini.

- Vit mugu bara royna at gera okkara, og tað gjørdu vit í dag, men enn eru hini úrslitini ikki í parti við okkum. Vit kunnu so bara gera tað, at vit fara út at vinna tveir stuttligar dystir afturat, segði Hjalgrím Elttør eftir dystin sunnudagin.

Og tveir sigrar eru nóg mikið hjá tykkum?

- Tað mugu vit vóna. Vit hava HB í Havn, har teir vónandi hava fingið eitt sindur av gummibeinum, og so hava vit EB/Streym her norðuri. Tað eru tveir truplir dystir, men vónandi klára vit at vinna teir, segði Hjalgrím.

-mørk